# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politiskt maktarloysi

Tað eru trettan mánaðir síðani, at vit seinast vóru á løgtingsvali. Síðani tá eru tvær samgongur skipaðar, og síðani tá hava allir flokkarnir í tinginum - undantikið Sjálvstýrisflokkurin - sitið í samgongu. CHE samgongan sat í eitt hálvt ár, og nú fer tað skjótt at verða eitt hálvt ár síðani, at seinna ABC samgongan sá dagsins ljós.

Stýrisskipanarlógin sigur, at løgtingsval skal verða fjórða hvørt ár. Tað vil siga, at um val ikki verður útskrivað av øðrum ávum, so verður løgtingsval um knappliga trý ár. Um tað verður í januar 2012, ella um tað verður upp undir ársskiftið 2011 er ein onnur søga, sum tað er ivaleyst av tíð at umrøða og taka støðu til. Undir øllum umstøðum eru tey, sum sita við ábyrgd, neyvan áhugað í, at tann støðan kemur í aftur, sum var upp undir jól í 2007, tá ið ein rúgva av lógaruppskotum fullu burtur, tí ætlanir um at broyta formligar ásetingar ikki vunnu frama.

Í politikki eru trý ár eitt langt tíðarskeið. Seinastu dagarnir hava verið eyðkendir av politiskum turbolensi. Landsstýrisfundurin fyrrapartin hósdagin endaði ikki, sum tað var lagt upp til. Í hesi vikuni skulu lógaruppskot, sum skulu viðgerast í hesi tingsetuni, sendast løgtingsskrivstovuni. Ætlanin var, at stórur stakkur hósmorgunin skuldi avgreiðast frá landsstýrinum og til løgtingsskrivstovuna, men orsaka av viðger ella orðadrátti um akutt mál varð einki mál avgreitt.

Í blaðnum fríggjakvøldið var høvuðssøgan, at Javnaðarflokkurin hóttir við at slíta samgongusamstarvið. Formenninir í samgonguflokkunum hava síðani tá spælt spyrjandi, undrandi og óvitandi, tá ið teir hava verið konfronteraðir við hesa søguna. Sjáldan ríkur av ongum brandi, og í vikuskiftinum og í dag hava útmeldingarnar verið nógvar.

Í morgun vildi Sjálvstýrisflokkurin hava játtanina í íløgukervið flutta í undirvísing, gransking, sosialar veitingar og heilsuverkið. Bíðiraðin at seta munnligar fyrispurningar er so long, sum hon plagar at vera upp undir val, og í morgun trumfaði formaðurin í tingbólki Fólkafloksins: Samgonguflokkurin, sum ongantíð vildi hava nakað við samhaldsfasta at gera, krevur nú, at útgjaldið skal hækka. Partapolitisku hegnpelarnir verða trýstir niður. Eingin vil vera verri fyri enn nakar annar, um tað skuldi komið har til, at val verður útskrivað.

Og so er spurningurin, hvat politiska leiðslan sigur og ger. Tað er ilt at fáa eyga á. Løgmaður tosar um samgonguskjalið og Europa, fólkatingsmaðurin hjá Sambandinum tosar um ES limaskap, uttanríkisráðharrin tosar um EFTA limaskap. Um alstóru innanlands trupulleikarnar sigur samgonguleiðarin einki, og samgongan rekur á havinum sum eitt skip í ódnarveðri uttan kumpass og uttan kós.

Tað kann gott vera, at samgongan fer at larra víðari, men politiski turbolensurin boðar ikki frá stórum tøkum, nú síðsta freist fyri at leggja uppskot fram í hesi tingsetuni bara er nakrar dagar burtur.

**Sosialurin**

## Skal løgmaður kunna vísa reyv?



SJÚRÐUR SKAALE

**Samgongan blokkerar fyri, at lásagølan verður kannað og fær avleiðingar. Tað er tekin um eina politiska skipan á vandakós**

Sosialurin bar í gjár tey tíðindi, at sonevnda "lásagølan" ikki verður kannað. Hetta er ikki endaligt - men nógv bendir á, at málið verður slept.

Í tí sambandi kann vera áhugavert at hyggja at, hvat gølan snúði seg um:

Fyrst verður ein grov lygisøga plantað í ein fjølmiðil. "Watergate í Tinganesi" sigur tann ófrættakenda yvirskriftin.

Síðani brúkar leiðslan í Føroya Javnaðarflokki ta plantaðu søguna í einum sjáldsama skitnum politiskum spæli.

Fyrst heldur Jóannes Eidesgaard tíðindafund í Tinganesi, har hann fremur eitt tað grovasta karaktermorðið nakrantíð.

Síðani fer Eidesgaard í sjónvarpið, har hann aftur, við allari tyngdini í løgmansembætinum aftanfyri, ákærir Høgna Hoydal fyri at hava gjørt nakað, sum "minnir um Watergate".

**Grovur kriminalitetur**

Tá løgmaður nýtti sítt embæti til at seta fram eina so álvarsama ákæru, kundu fólk ikki annað enn hugsa, at Høgni veruliga hevði gjørt okkurt kriminelt.

Tí Watergate var ikki smáting. Watergate var grovasta politiska brotsverk í USA í farnu øld. Tað snúði seg um innbrot. Um stuldur. Um njósning. Og um ólógliga avlurting.

Tað snúði seg um so grovan politiskan kriminalitet, at eingin hevði trúð, at leiðarin í heimsins fremsta fólkaræði kundi gera slíkt.

Men hetta kvøldið stóð Jóannes Eidesgaard altso í sjónvarpinum og segði, at Høgni Hoydal hevði framt nakað, sum minti um Watergate! So álvarsom var lásagølan!

Soleiðis legitimeraði Eidesgaard avgerðina um tveita Tjóðveldi úr samgonguni - og sjálvur verða sitandi sum løgmaður.

Og tað kvøldið mundu tey flestu skilja hann. Sjálvandi kundi Jóannes ikki samstarva við ein grovan brotsmann!

**Eidesgaard breyt lógina**

Eisini í Tjóðveldinum fingu vit sjokk. Kundi hetta veruliga passa?

Nei. Eftir nakrar turbulentar dagar máttu øll staðfesta, at Jóannes Eidesgaard hevði logið. Í løgmansembætisins navni hevði hann sett fram grovar, falskar ákærur.

Ein óheftur advokatur kannaði málið. Hann kom fram til, at tað var Eidesgaard, sum var farin útum sínar heimildir í lásamálinum.

Næsti óhefti advokatur kom til somu niðurstøðu.

Ein advokatur, sum var í starvi hjá Jóannesi, tulkaði síðani hendingarnar øðrvísi enn hinir báðir, og helt Hoydal vera farnan ov langt.

Men allar advokatfrágreiðingarnar vístu púra greitt, at teir grovu póstandirnir hjá Jóannesi Eidesgaard um kriminalitet, vóru ógrundaðir.

Um hann breyt lógina, er kanska eitt ivamál. Men eingin ivi er um, at Eidesgaard misnýtti Føroya hægsta embæti í sínum persónliga valdsstríði.

**Eingin kanning**

Landsstýrismálanevndin kann seta ein kanningarstjóra, um illgruni er um lógarbrot.

Men tá málið var fyri har, avgjørdi meirilutin - Jaspur Vang og Andrias Petersen - at tað ikki skuldi kannast. Tí har var eingin illgruni, søgdu teir...

Tríggir advokatar høvdu sagt, at nakað galið var gjørt. Eidesgaard hevði tosað um Watergate. Hoydal segði, at Eidesgaard hevði framt valdsmisnýtslu. Og í øllum grannalondunum vóru Føroyar gjørdar fyri skommum.

Men Andrias og Jaspur hildu ikki, at nakar illgruni var um nakað...

Tá byrjaði málið at lukta. Tá fekk ein ta fatan, at endamálið var at varðveita valdið. Og at sannleikin um lásagøluna kundi órógva hetta endamál. Tí skuldi sannleikin ikki fram í ljós.

Síðani hevur Sjálvstýrisflokkurin royndt at savna undirskriftir, so ein kanning kann gerast - men teimum vantar ein undirskrift: Eingin í samgonguni vil skriva undir!

Tað luktar ikki minni.

**Kann enda við Watergate**

Við hesum sendir Føroya Løgting eitt greitt, men eitrandi signal: Politikkur snýr seg bara um vald! Um at hava vald, ella ikki at hava vald! Lógir, reglur og moralur - tað hevur ongan týdning. Hevur tú vald, hevur tú rætt!

Hevur tú vald kanst tú, myndaliga talað, altíð vísa tínum mótstøðumonnum reyv. Vanligar reglur um atburð eru ikki galdandi fyri tann, sum hevur vald.

Verða spírar við hesum hugburði ikki traðkaðir niður beinanvegin, er vandi á ferð. Tí slík hugsan kann skjótt fáa fastatøkur í ovastu leiðsluni. Júst sum hon gjørdi hjá Nixon í 1972, tá hansara menn brutu inn í Watergate...

Men spírin hjá Eidesgaard verður ikki traðkaður niður. Løgtingið lívgar heldur um hann.

Tað er tekin um eina politiska skipan, sum er á vandakós.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.